

Same procedure as last year:

# Same procedure as every year

**Triða árið í slag kann HB rópa seg føroyameistara. Hetta varð staðfest í Gundadali sunnudagin, tá HB vann grannauppgerðina, samstundis sum Skála snávaði á heimavølli móti KÍ**

FØROYAMEISTARAR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað ljóðaði kanska eitt sindur omaná, men lýsingin frá HB í Útvarpinum kundi neyvan misskiljast. Nú støðan enn einaferð hevði lagað tað soleiðis, at HB er føroyameistari í mansfótbólti, sá felagið seg aftur í ár noytt at skipa fyri FM-dansi í felagshúsunum.

So var støðið líka sum lagt, og fyri B36 viðhaldsfólk mundi støðið helst eisini vera lagt longu tíðliga sunnumorgunin. Veðurgudarnir hava annars ofta lagað tað soleiðis, at veðrið hevur verið av tí allarbesta, ta´grannauppgerðir hava staðið á skránni, men allan sunnudagin oysti heystarregnið omanyvir høvuðsstaðin. Og tað var kanska eitt slag av einum metafori, tá Týr og teirra tungi rokktónleikur so eisini varð sett sum upphiting til grannaslagið.

Tí tungt var tað í øllum førum hjá B36 sunnudagin. HB stóð fyri triðja árið á rað sum meistarar, tá Lassin Isaksen hevði bríksláð fyri seinastu ferð.

## Nervin var við

Undan hesum høvdu tey mongu viðhaldsfólkini hjá havnarfeløgunum verið vitni til ein dyst av teimum heilt spennandi. Kanska var talan ikki um best leiktu uppgerðina á árinum, men nervin og intensiteturin var alla tíðina til staðar.

B36 gav alt fyri eitt til kennar, at stóð tað upp til teir, so skuldi tað so í øllum førum ikki vera í dag, at HB skuldi standa sum meistarar. Frá fyrsta bríksli var talan um harðan dyst um hvønn einasta bólt, og hvørgin parturin megnaði at vinna seg fram til nakra veruliga yvirvág.

Vindurin darvaði kanska spælinum nakað, og tað var HB, sum átti hendan í ryggin fyrra umfarið. Talan gjørdist tó ikki um nakað massivt trýst oman móti B36-málinum, og heldur var tað kanska B36, sum við eini røð av hornaspørkum tóktist meira nærgangandi fyrstu longu løtuna.

Hinvegin tóktist tað meira vandamikið,tá HB setti ferð á móti málinum. Við Heðini á Lakjuni og Jákupi á Borg í hvør sínum borði, var ferðin alla tíðina nógv, og fleiri ferðir varð roynt at stinga inn um B36-verjuna, sum tó fyri tað mesta megnaði at standa á røttum stað.

## Tungt hjá B36

Dygst undan steðginum eydnaðist tó HB at leggja seg á odda. Eftir hornaspark ferðaðist bólturin nakað í brotsteiginum, áðrenn Símun Eliasen royndi seg. Skotið var ikki so hart, og uttan iva hevði Magnus Poulsen tamarhald á støðuni. Allan Mørkøre – sum annars mnudi vera besti B36-leikarin fyri steðgin – royndi tó at stúta bóltin burtur, men hann fekk ikki meira enn broytt kósina á honum, og so var HB á odda.

Hetta noyddi B36 í enn størri mun at leggja dent á álopspartin eftir steðgin, men tað var tó skjótt, at uppgávan varð gjørd enn truplari. Á miðjum vølli hevndi Alex dos Santos seg móti Jákupi á Borg, og so fekk Lassin Isaksen illa gjørt annað enn at geva brasiliumanninum reyða kortið.

B36 fall tó ongantíð í fátt. Støðugt royndu teir at skapa eitt trýst oman móti HB-málinum, og tó at ein mest sum ósjónligur John Petersen varð tikin skaddur av vøllinum, so tóktust teir alla tíðina hava vónina um, at setningurin ikki var heilt ógjørligur.

Men tað eydnaðist so ikki, kortini. Fyrst og fremst tí HB verjan hevði tamarhald á tí allar mesta av tí, sum fór fram, og hóast B36 hevði bóltin nógv, so gjørdist talan ongantíð um veruligar málmøguleikar.

So var HB nakað nógv nærri við at økja til 2-0, men tá teir vóru ikki nóg neyvir, tá teir fingu kontramøguleikarnar. Magnus stórbjargaði, tá Heine Fernandez slapp leysur, og tá bæði Jákup og Rógvi raktu træverkið, mundu tey í HB skýlinum halda ondini.

Men tað nýtist teimum so ikki longur. Leiðslan hjá HB helt, og tá KÍ so samstundis órógvaði Skála, kundu HB-viðhaldsfólkini aftur í ár tysja inn á vøllin. Triðja árið á rað hevur felagið vunnið FM-heitið í føroyskum mansfótbólti, og ikki nóg mikið við tí. Á 100 ára degnum er felagið nú eisini tað mest vinnandi yvirhøvur í føroyskum fótbólti. Ein heiður, sum KÍ annars hevur átt leingi.

### FAKTA UM DYSTIN

**HB-B36 1-0 (1-0)**
1-0: sjálvmál, 43
**HB:** Bárður Johannesen – Hallur Danielsen, Jan C. Dam, Símun Eliasen, Janus M. Joensen – Jákup á Borg, Rúni Nolsøe, Kári Nielsen, Heðin á Lakjuni – Heine Fernandez, Rógvi Jacobsen
**Gult kort:** Heðin á Lakjuni, 14., Rúni Nolsøe, 45., Rógvi Jacobsen, 81.
**B36:** Magnus E. Poulsen – Allan Mørkøre, Jóhannis Joensen, Pól Thorsteinsson, Jens Kristian Hansen – Bárður Mortansson (Arnbjørn Danielsen, 65.), Klæmint Matras, Ronnie Samuelsen, Alex dos Santos – Bergur Midjord (Levi Hanssen, 65.), John Petersen (Egil á Bø, 52.)
**Gult kort:** Jóhannis Joensen, 22., Allan Mørkøre, 73., Ronnie Samuelsen, 80.
**Reytt kort:** Alex dos Santos 49
**Dómari:** Lassin Isaksen. Var kanska nakað seinur við fyrsta gula kortinum, tí alt fyri eitt komu bæði vakrar og minni vakrar tacklingar sendandi gjøgnum luftina. Megnaði tó skjótt at finna eina linju at koyra dystin eftir, og tó at floytaríið onkra tíð kundi tykjast í meira lagi, so tóktist hetta vera tilvitað valt, til tess at halda takinum í dystinum.



# Hava verið effektivir

**Símun Eliasen var sjálvandi ovurfegin eftir enn eitt gullmerki. Hesaferð stóð verjuleikarin enntá sum match-vinnari**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á pappírinum varð sigursmálið hjá HB sunnudagin skrásett sum sjálvmál, men hóast hetta, so mundi Símun Eliasen kenna seg eiga ein part av hesum. Sjálvur greiddi verjuleikarin soleiðis frá, tá vit fingu orðið á hann eftir dystin.

– Skal eg vera erligur, so var málið kanska eitt sindur tilvildarligt. Kári fekk bóltin eftir hornaspark, men fekk ikki rættiliga skot á. Eg royndi meg so við høgru skoytu, og so var eg heppin, tá Allan snittar bóltin upp um egnan málverja.

Soleiðis greiddi Símun Eliasen eftir dystin sunnudagin frá málinum, sum endaliga vissaði HB meistaraheitið triðja árið á rað.

Og tað er einki at ivast í, at talan hesaferð er um eitt tað tryggasta meistaraheitið, sum yvir høvur er vunnið í føroyskum mansfótbólti. Ellivu stig eru niður til næsta liðið, nú trý umfør eru eftir at spæla, og tað bendir í øllum førum á stóran styrkismun. Men hevur HB eisini verið somikið nógv betri enn hini liðini í ár?

– Vit hava í øllum førum havt tann breiðasta hópin, og tað hevur havt nógv at siga. Hartil haldi eg, at vit í ár hava spælt sera effektivt. Vit ansa eftir, at vit ikki missa nakrar býttar bóltar í uppspælinum, sum hini kunnu revsa, og so hava vit sjálvandi eisini havt nakrar leikarar, sum eru førir fyri at skjóta málini, staðfesti Símun Eliasen at enda.



*Hildur fekk sjálvandi eitt ordans klemm, nú babba var maðurin, sum tryggjaði HB meistaraheitið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Gamlar kempur



*Hesir tríggir hava mangan tikið tøk á vøllinum, ta tíð tað var. Nú er tað tó uttan fyri vøllin, at teir gera um seg, og trúgvir hava teir verið. Heri Nolsøe, Martin á Mýruni og Eirikur Rasmussen munnu allir tríggir vera ímyndin av sonnum HB'arum*

*Mynd: Jan Müller*

www.sosialurin.fo




**Til sølu**

**Ognin matr. 1381E og 1381F, Tórshavn, Heykavegur 6, Tórshavn, verður við hesum lýst til sølu**

Til ognina hoyrir virkisbygningur, partvís í tveimum hæddum, til støddar 2.968 $m^2$ brutto, privat parkeringsøki til støddar 2.400 $m^2$ og stórt alment parkeringsøki. Goymslu-/amboðsskúrar uppá 271 $m^2$ hoyra eisini til ognina.

Byggiár: 1978

Ognin liggur væl fyri á ídnaðarøkinum á Hálsi og hevur tvær tilkoyringar.

Ognin verður seld um hóskandi boð fæst.

Áhugað kunnu venda sær til Føroya Tele, Jens Wang, tlf. 303030 ella 303007.

FØROYATELE